## DAGSINS MEINING

# ST á vegamóti

Altjóða felagskapurin Sameindu Tjóðir er komin á eitt vegamót. Felagskapurin er, um ikki í kreppu, so í álvarsomum trupulleikum. Atgerðarloysi, fíggjarligir trupulleikar og korruptión hava merkt stovnin seinastu árini. Hetta er almikið spell, tí heimurin kann heilt einfalt ikki vera ST fyriuttan. Hóast nevndu trupulleikar er ST hóast alt tann stovnur, ið er best skikkaður at varðveita heimsfriðin og at veita humanitera hjálp, tá tær stóru vanlukkurnar raka. Fyrisitingarliga leiðslan í ST við Kofi Annan á odda hevur eisini víst ein sterkan vilja at rudda upp í óskilinum og ST er aftur á beinari kós.

ST stendur og fellur við tí stuðli og uppbakking, ið stovnurin fær frá stórveldunum. Tey fyrstu mongu árini høvdu vestanveldini tað stóra orðið at siga í ST. ST gjørdist meira og minni eitt amboð hjá vestanveldunum, serstakliga USA í kalda krígnum. Koreakríggið er var eitt gott dømi um hendan leiklutin hjá ST. Men avkolonialiseringin í sekstiárunum gjørdi, at stórpolitiska javnvágin í ST broyttist. Fleiri av nýggjum londunum myndaðu saman við India, Egyptalandi, Indonesia og Jugoslavia ein uttanveltaðan blokk í ST, ein blokk, sum hvørki vildi akta USA ella Sovjet. Ein politisk fylgja av hesum var, at USA ikki longur hevði tann stóra áhugan í ST. Ein onnur fylgja av hesi støðu USA var, at stórveldið sýtti fyri at rinda ST limagjald og hevur tískil verið í eftirstøðu í áratíggjur. Hetta var ein løgin støða, sum Clintonstjórnin royndi at koma USA burturúr. Ein avtala um skuldina hjá USA til ST var um at koma uppá pláss, tá forsetaskiftið varð og so kom steðgur í. Síðan eru viðurskiftini millum ST og USA bert versnað.

Støðan er vernsað enn meira eftir, at Bush forseti hevur tilnevnt Bolton til umboðsmann USA í ST. Bolton er tiltikin fyri at vera beinleiðis ímóti ST. Hann metir ST sum eitt amboð hjá fíggindum USA, og hann heldur onga orsøk vera til, at hesin stovnur skal vera staðsettur í USA. Hann hevur ta principiellu áskoðan, at týðandi heimspolitiskar avgerðir eiga at verða tiknar av stórveldunum uttanum ST. Hann kann ikki fyrigeva ST, at hesin heimstovnur var ímóti krígnum í Irak. Hann er hart ímóti, at USA skal rinda sína skuld til stovnin og hann dylur ikki fyri síni vanvirðing fyri ST og øllum tí, sum ST stendur fyri. Hetta er mikið spell, tí ST er sum nevnt inni í eini sera týðandi menning, og stórar bygnaðarbroytingar standa fyri framman. Alt nakað, sum skal nútímansgera ST og menna felagskapin til tann týðandi leiklutin sum heimsins mætasti humaniteri og friðarvarðveitandi stovnur. At Bush hevur tilnevnt Bolton til ST umboðsmann er eitt syndarligt signal, sum sigur, at USA framvegis ætlar at niðurgera og vanvirða hendan sera týdingarmikla stovnin. Tað er mikið spell og hartil ein stór skomm fyri landið, ið stendur sum fyrimyndin hjá mongum frælsis- og friðarelskandi europearum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Sjálvandi er hall á landsins fíggjarlóg

**Sambandsflokkurin**
*Kaj Leo Johannesen*



Tað at inntøkusíðan hjá landskassanum í 2002 varð lækkað við 366 mió. krónur um árið, var ikki ein skilagóð avgerð. Hetta hevur higartil kostað okkum føroyingum slakar 1,4 milliardir krónur í mistum inntøkum, og sjálvandi kemur hetta at merkjast í okkara búðskapi, sum er lítil og viðbrekin.

Nú nyttar ikki at gráta og angra og geva øðrum ábyrgdina av at hall er á landsins fíggjarlóg. Hetta var almenn vitan millum samgongu- og andstøðulimir í farnu valskeiðum, og ávaringarnar frá Sambandsflokkinum vóru nógvar og konkretar.

Avleiðingarnar av hesum ógvusliga niðurskurði eru als ikki komnar í hæddina enn. Tær byrja nústani, so her er ikki nógv annað at gerða enn at húsast við teimum inntøkum, sum framvegis eru tøkar, og síðani arbeiða við skipanum sum fremja búðskaparvøkstur í framtíðini.

Samsvar má vera millum inntøkur og útreiðslur

At halda at vit kunnu økja um tær almennu útreiðslurnar, samstundis sum vit skerða so ógvusliga í inntøkugrundarlagnum, vita allir føroyingar, at tað letur seg ikki gerða. Vit noyðast tí at fáa tilvega slakar1,4 milliardir. Men um vit tosa um fíggjarlógina fyri 2006, sum nú verður løgd fyri tingið, skulu 366 mió. krónur leggjast afturat hesum talinum, umframt einar 100 - 200 mió. krónur sum eru mistar við at heildarveitingin er fastfryst. Alt í alt er hetta talið sostatt komið uppá umleið 2 milliardir krónur. Síðani skulu vit antin spara ella fáa meirinntøkur fyri 366 mió. krónur um árið, hvørt ár framyvir, bert fyri at halda sama støði sum áðrenn blokkniðurskurðin.

### Mugu handla eftir fortreytunum

Vit fara eisini í framtíðini at húsast á hesum klettum, og vit fara eisini at hava tað gott. Eingin ivi um tað. Men tá fólk undrast á, at endarnir ikki røkka saman, so er frágreiðingin so sera einføld. Ein meiriluti av løgtinginum hevur samtykt at lække blokkin við 366 mill. krónur um árið, og soleiðis verður tað. Nú er tað upp til sitandi samgongu at syrgja fyri at avleiðingarnar verða so lítlar sum gjørligt.

# Ferðaætlanin hjá Smyrli

**Jacob Vestergaard**



Støðan í Suðuroynni hevur verið nógv viðgjørd hetta seinasta árið. Seinasta dømið er ferðaætlanin hjá nýggja Smyrli. Hóast vitandi um hvussu stóran týdning ferðasambandið til og frá Suðuroynni hevur fyri menningina og trivnaðin í Suðuroynni, er ikki vilji til at økja túratalið, nú nýggi Smyril kemur.

At soleiðis er, er onki nýtt. Hetta hendir nærum hvørja fer. "Vit skylja tykkara støðu, men tað kostar ov nógv". Tað skortar ikki við jaligum viðmerkingum og uppskotum um batar, men tá ítøkilig stig skulu takast og neyðugi peningurin játtast, ber ikki til.

Uttan at fara nærmari inn á ferðaætlanina, tað skuldi ikki verið neyðugt, tí flest øll vita hvønn týdning ferðasambandið hevur, so kann ein staðfesta, at ymiskar grundgevingar verða nýttar, alt eftir hvar ein er í landinum. Á Suðuroyarleiðini skal ein fyrst síggja um Smyril siglir fullur av fólki og farmi hvønn túr eftir verandi ferðaætlan, áðrenn túratalið kann økjast. Sama er ikki galdandi á hinum farleiðunum, men tá tað snýr seg um Suðuroynna, kunnu slíkar grundgevingar nýtast, og tað vísur seg tíverri, at tær verða góðtiknar.

Í januar mánað í ár kom landsstýrið við einari "Suðuroyarætlan", sum við 10 punktum lýsti, hvussu vánaliga støðan í Suðuroynni kundi vendast.

Hóast fleiri av punktunum vóru staðfestingar av betringum, sum longu eru framdar ella settar á dagsskrá, kundi ein fegnast um, at politiski mynduleikin tók støðuna í Suðuroynni í álvara, og viðgjørdi hana á hægsta stigi.

Endamálið við "Suðuroyarætlanini" er at javnstilla Suðuroynna við restina av landinum. Undir punkt 2 í "Suðuroyarætlanini" ásannar landsstýrið, at Suðuroyggin er sera fjarskotin bæði tá tað snýr seg um flutningssambandið innanoyggja og við útheimin o.s.fr.

Hóast landsstýrið í januar í ár ásannaði trupuleikan og legði upp til batar, vísur tað seg nú, at tað ikki ber til at fáa økt túratal við nýggja Smyrli. Viljin vísti seg at verða góður, men tá ítøkilig stig skulu takast - neyðugi peningurin játtast - ber ikki til.

Søgan endurtekur seg. Hetta er tíverri ikki eindømi, heldur ikki tá tað snýr seg um "Suðuroyarætlanina". Tí mugu allar góðar kreftir taka seg saman, fylgja ætlanini - tí góða viljanum, sum var - upp, so vit veruliga fáa nakað burturúr.

Vit hava ivaleyst sjálvi ein part av skuldini, tað er sjón fyri søgn. Sjálvt tá tað snýr seg um eitt so upplagt og sjálvtsagt ynski, sum at fáa Smyril at sigla tríggjar túrar hvønn dag, standa vit ikki saman. Men tá tað vísur seg tó hvørja fer, at tað sum er ein sjálvfylgja aðrastaðir, ber ikki til í Suðuroynni.

Nú síðsta hond verður løgd á fíggjarlógaruppskotið fyri 2006, skal eg minna á "Suðuroyarætlanina". Tað er nú tann góði viljin skal vísast í verki.

Eitt betra ferða- og flutningssamband millum Suðuroynna og Havnina, við minst trimum túrum hvønn dag, er eitt ítøkiligt stig tann rætta vegin.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.